# Her hittast ung og gomul

## *Kondittaríið í Havn missir ikki arbeiðsfólk*





*Arbeiðið hjá Merry og hinum á Kondittarínum er allan dagin at borðreiða og taka av aftur borðinum*

Myndir: **Kalmar**

Orð: **Randi**

Ein týsmorgun á Kondittarínum í Havn. Ikki heilt vanligur, tí tað merkist, at skúlarnir eru stongdir: eingir skúlanæmingar.

Kanska í minna lagi av fólki, men annars er alt, sum tað plagar at vera.

Við eitt vindeyga sita nakrir og tosa um leyst og fast. Bløðini eru frammi, veðrið og verkfallið. Lærarar eru ímillum, sum hava frí, og teir tosa eisini um ársroyndina, sum stendur fyri durum, og sum er nervað av verkfallinum.

Onnur sita einsamøll við einum kaffikoppi og lesa bløðini. Onkur hevur verið til handils og er komin inn at fáa ein munn. Nakrar skúlagentur, sum hava frí, sita og roksa og roykja og drekka sodavatn.

Klokkan er úti við tíggju. Borðið við tað innasta vindeygað er reserverað, soleiðis sum tað er hvønn morgun hesa tíðina. Kopparnir standa klárir. Fimm eru teir, sum hvønn einasta fyrrapart hittast við sama borð á Kondittarínum. Men henda dagin er teir bara tveir, hinir eru antin burturstaddir ella hava forfall frá morgunfundinum á Kondittarínum.

### Tær støðast

Umframt eina, sum arbeiðir í køkinum, og eina, sum vaskar, eru tær fýra, sum servera. Tvær arbeiða í senni. Tvær frá átta til trý, hinar frá trý til sjey. Kondittaríið er annars opið frá níggju til seks.

Tær hava allar fýra arbeitt leingi á Kondittarínum, millum 10 og 20 ár.

— Hví? Tí her er so gott at vera. Arbeiðið er sjálvstøðugt, vit gera, sum vit vilja, og aldri er eitt øvugt orð okkara millum, siga Hanna og Merry.

### Nógv vitja

Tær lata eisini væl at teimum, sum koma inn á Kondittaríið. Fleiri teirra kenna tær so væl, at tað er sum ein familja. Tað er ikki nakar ávísur samfelagsbólkur, sum er á Kondittarínum. Har koma øll. Líka frá barnagarðsaldri og til eldri fólk. Fleiri halda fram við at vitja Kondittaríið ár eftir ár, og fleiri av teimum vaksnu siga seg hava lagt ein stóran part av lummapengunum eftir seg á Kondittarínum.

Eini 40-50 fólk vitja eisini Kondittaríið í døgurðatímanum. Tá ber til at fáa frikadellur og eplasalat, ella eisini ein bita aftur við einum drekkamunni.

Arbeiðið hjá teimum er javnt allan dagin. Har er so at siga altíð fólk. Beint eftir arbeiðstíð eru tey kanska fleiri, tí vanligt er at møtast á Kondittarínum. Um summarið, tá alt ferðafólkið vitjar, kann onkuntíð vera eitt sindur trongligt, men strævið vilja Hanna og Merry ikki kalla arbeiðið. Teimum dámar fólkini — og fólkunum dámar Kondittaríið.



*Hjørleif Kúrberg og Petur Sigurd Rasmussen hava í áravís verið fastir gestir á Kondittarínum*